tíðindablaðið sosialurin
Postsmoga 76,
3800 Argir,
telefon 11820
Útgevari: p/f sosialurin
Fyritaksstjóri og blaðstjóri: Tórfinn Smith (ábyrgd)
Blaðfólk: Høgni Djurhuus, Dagny Joensen, Jóhann Mortensen og Jan Müller
Lýsingar: Árni Joensen
Uppseting: p/f sosialurin. Prent: p/f pressan 1981

Fyri trygdar sakir

oddagrein

EIN hendin av tí slagnum sum vit nú fyri triðju ferð hava verið úti fyri við fiskiskipum, sum eru farin á gátuføran hátt, bygd á somu skipasmiðju og longd á somu skipasmiðju, gevur eisini orsøk til eftirtanka, fyri trygdarsakir; tí her eru veruliga hendingar, sum hava loypt hvøkk í mangan. Harfyri eru tað ikki okkara orð, at tað eru skipasmiðjurnar, hvørki í Eysturtýsklandi ella í Føroyum, sum eru orsøkin. Orsøkirnar kunnu vera so mangar.

TAÐ verður gjørt nógv frá almennari síðu til at tryggja sær, at forsvarliga verður farið fram í øllum viðurskiftum, sum hava við bát og skip at gera. Vit hava skipasýn, eftirlit og trygdarreglur av ymiskum slag, alt fyri at forða, at óhapp henda.

OG TÁ óhappið so hendir, í hesum føri tíbetur uttan nakran mannskaða, so má tað vera ein sjálvsøgd uppgáva, at eftirkanningar verða gjørdar, fyri at finna útav hvørjar orsøkirnar kunnu vera, sum hava ført til at heili trý skip, sum eru bygd á sama plássi, eru farin og eftir øllum fyriliggjandi upplýsingum at døma á gátuføran hátt.

TÍ MEGU vit væntað og vóna at avvarandi myndugleikar nú gera alt sum er møguligt fyri at fáa eftirkannað hvørjar orsøkirnar til hesar døpru hendingar kunnu verða.

FYRI trygdar sakir.

Undirbrotligheitin

Onkur gniggjar hendur í miklari frøi, tí nú hava teir útlendsku millumhandlararnir at enda vunnið føroyingum svárar neisur — og í skerfløtum látri peika teir nú eftir føroyingum, sum nú hava latið sær lindað og so fullkomuliga givið yvir skarvin.

Tað er í veruleikanum hetta sum hent er við uppskoti landsstýrisins um biltollingina.

Stríðið millum teir sum selja japanskar bilar og teir, sum selja europeiskar bilar er eitt, men tað er eitt annað meira prinsipielt í hesum, lat okkum siga, sera trupla innlendis máli, sum gevur orsøk til eftirtanka.

Eitt kann sláast fast; tann peningur, gjaldoyra, sum skal út av landinum fyri keyptar bilar, minkar ikki við einum oyra við uppskotinum frá landsstýrinum. Ei heldur á hesum øki hevur landsstýrið víst evni til at spara, tvørturímóti.

Veruliga hevur landsstýrið givið skarvin yvir og fullkomuliga kapitulerað yvirfyri europeisku innflytarunum, sum jú ikki orka, at **føroyingar sjálvir innflyta beinleiðis frá framleiðara**, alt til Føroya skal gjøgnum einhvønn millumhandlara uttanfyri Føroyar. T.v.s. eitt dýrkandi millumlið.

Her hevur landsstýrið og tess flokkar givið skarvin yvir, fullkomuliga kapitulerað.

Bæði landsstýriini undan hesum løgdu dent á at fremja ein handilspolitikk, sum gav okkara egnu handilsmonnum eitt betri kort á hondina.

Tað var mett av størsta týdningi at stuðla beinleiðis innflutningi heldur enn innflutningi gjøgnum dýrkandi millumlið.

Tað er einki dulsmál at flokkarnir aftanfyri núsitandi landsstýri eru um at klóra eyguni hvør úr øðrum fyri at tekkjast teim handlandi. Samstundis sum veruleikin aftanfyri avgjaldsuppskotið fyri bilar klárt sýnir og er týðuligasta dømi um fullkomið frávik frá prinsippinum um beinleiðis innflutning frá framleiðaralandi, uttanum útlendskan dýrkandi millumhandlara.

Talan um fría marknaðarmekanismu, ella hvørji føgur orð teir sokallaðu »frísinnaðu« prýða seg við, eru læntar páfuglafjarðar.

Týðuligast sæst hetta nú við undirbrotliga uppskotinum um at allir føroyskir innflytarar av bilum skulu yvirgeva seg til einhvønn útlendskan millumhandlara. Nú kunnu millumhandlararnir ótarnaðir selja tað teimum lystir, uttan at vit frá føroyskari síðu so mikið sum rætt ahond frá síðu fyri at verja teir handilsmenn, sum hava roynt at framt beinleiðis innflutning.

Eftir politikki landsstýrisflokka skal tað hereftir bara vera uppgávan hjá føroyskum handilsmonnum at vera agentar fyri onkran útlendskan millumhandlara.

Hetta afturstig kemur ikki bara at galda bilinnflutning, men kemur at spjaða seg til ógagns fyri okkum øll, til dýrkan av øllum innfluttum vørum.

J. Lindenskov

Vertin á hvat annar fær

politisk viðmerking

Ólavsøku-tingsetan í ár varð ikki long, einans triggjar ella fýra dagar noyddust tingmenn at sita á tingi, fyri ikki at møta aftur fyrr enn seint í heyst.

Hesar fáu dagar vórðu kortini stór mál avgreidd, sum tildømis lógin um skattastigan.

Tað má haldast at tað er sjálvur skattastigin, ið hevur størsta áhugan ímillum fólkið í hesum landinum. Tað er skattastigin ið avgerð, ella sigur hvussu leiðis ið sjálvt býtið av skattinum skal verða býtt á hesar ymiskum lønarbólkarnar. Skattastigin er tí tann partur av skattalógini, ið hevur størsta týdningin fyri vanliga fólkið.

Tí kundi tað hugsast at henda viðgerðin varð bæði drúgv og long, men hetta varð júst tað øvugta.

Hetta stóra mál fekk onga viðgerð hvørki á tingi ella í skattanevndini. Viðgerðin í skattanevndini snúði seg um ein til tveir tímar.

Soleiðis má sigast at lógin um hvussu leiðis ið skattatyngdin verður býtt á føroyska skattgjaldaran, onga viðgerð hevur fingið. Yvirhøvur onga.

Hetta er ikki bert ódemokratiskt, men eisini sera ábyrgdarleys framferð. Soleiðis at trýsta eitt fyri fólkið so týðandi mál igjøgnum.

Eitt kann í hvussu er sláast rimmar fast, at tað eru tey fáu í hesum landi sum hava so góð ráð at gjalda skatt, sum fjøldin av teimum, ið umboða tey á tingi.

Spurningurin kemur uttan iva fram, hví skuldi hendan viðgerðin skundast so ómetaligt igjøgnum eftir einum degi??

Er veruliga stoðan hon, soleiðis sum onkur sigur, at menn hava ikki stundir at røkja sítt politiska arbeiði, sum teir eru valdir til at fremja.

Er tað veruliga soleiðis, at tingarbeiðið kemur í aðru røð hjá nógvum framstandandi politikarum, í okkara lítla samfelag. Ongum øðrum líkt.

Heldur ikki slepst frá spurninginum um tað munnu vera landsstýrismenninir, ið ikki vilja sleppa tingsessinum og møguliga skulu burtur, kanska uttanlands, her er kortini bert talan um sambandsmenninar í landsstýrinum.

Ella eru tað møguliga allir lærararnir í samgonguni ið nú skulu hava hoyggið til høvdar áðrenn enn skúlin byrjar aftur.

Ella hava grannskoðaravirkini so nógv um hendur, at nú kann ikki haldast ting?

Møguliga onkur stjóri í samgonguni, sum ikki júst nú kann láta sína kostnaðarmiklu tíð fara til at viðgera tær skattabyrðar, ið skulu leggjast á vanliga fólkið.

Sjálvir eru teir so nøkunlunda tryggjaðir, av tí at skattalógin er teirra verji, har er eitt lok á skattalógini, sum ger, at teirra lønir verða skerdar minst møguligt. Í hvussu er verður ongantíð meiri enn helmingurin latin av teirra fýra ella fimmfaldaðu arbeiðaralønum.

Eg haldi tað er eisini vert at draga fram, at ein heldur seg hava frænir av, at tingfundirnir verða lagaðir eftir ávísum samgongumonnum, ið sita í almennum føstum størvum, og at har kann ikki tímin latast av hondini.

Tingmenn eru valdir og fáa løn fyri at gera og at viðgera tær lógir, ið hetta samfelag skal stýrast eftir. Hetta arbeiðið átti tí at komið í fremstu røð.

Hetta minnir annars um embætismannatíðina, sum Nólsoyar Páll kvøður um, tá ið hann sigur:

Tjógvi við sítt klipta vel
hugsar við sjálvum sær
vertin á hvat annar fær
EG skal nøra mær.

Jú rætt er tað at tíðirnar endurtaka seg.

Jørgen Thomsen

Aftaná ólavsøku

Útsløktur brandur
Risti sum tandur,
tankarnir mala í kring

Liggi sum hítin
Ríkur og hvínur í pípuni,
stari. — Tanker í strípum.

Heitur tó kaldur,
veikur í sinni.
Vaknar tá minni.

Hugmyndir hómast.
Roðni og blikni
Knokkleysur í rúsi!

Liggi í vøku aftaná Søku
Paranoid, skizofren.
Var ikki verri!

Lættir tó dimmið,
kámast tá minni,
styrkist í sinni.

HN.

Framhald av síðu 5

vik hevur nógv gott fólk, so tað skuldi ikki verið nakað til hindurs fyri at mannað ein valevnislista til komandi býráðsval, uttan at eg skal vera á listanum.

— **Er tað tín uppgáva sum tingmaður einans at røkja áhugamálini hjá Norðoyggjum?**

— Ikki einans tað. Ein umboðar samstundis ein politikk og nøkur politisk sjónarmið.

— **Hvørji mál heldur tú sum tingmaður eru serliga týdningarmikil at røkja og fremja til frama fyri títt valdømi?**

Samferðsla

— Tað er fyrst og fremst á samferðsluøkinum. Bæði til og úr Norðoyggjum og millum bygdir og oyggjarnar her norðuri. Hetta hevur stóran týdning fyri trivnaðin í hesum partinum av landinum.

Teir pengar tað almenna setir av til havnarútbygging hava eisini stóran týdning fyri hetta lið. Tað er framvegis neyðugt at

Framhald á síðu 15